UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## Missa nógv

Alt bendir nú á, at dansk-russiska reiðaríið Sevryba fer á húsagang, og at tað verður ørskov-skipasmiðjan í Frederikshavn, sum fer at kenna sviðan av húsaganginum. Sambært leiðsluni kann skipasmiðjan missa einar 150 mió. krónur av húsaganginum, og tað kann, um illa vil til, taka beinini undan skipasmiðjuni. Hendir tað, kunnu 350 arbeiðsmenn á nýbygningsdeildini vænta at verða koyrdir til hús.

## Dýrari at læna pengar

Ein kanning hjá norsku hagstovuni vísir, at tað er vorðið dýrari at læna pengar úr teimum norsku peningastovnunum. Hagstovan sigur, at verða renta, prísvøkstur og rentufrádráttur í skattinum tikin upp í roknistykkið, kostar eitt lán upp á 1,2 mió. krónur 36.000 krónur meiri um árið nú enn fyri fimm árum síðani.

## Misti 13 mió. kr. um dagin

Tað gongst sera illa hjá skandinaviska flogfelagnum SAS. Tríggjar teir fyrstu mánaðarnar í ár hevði felagið meiri enn 1,1 mia. krónur í halli, og tað merki8r, at felagið misti 13 mió. krónur um dagin hesar tríggjar mánaðarnar.

Hagtølini hjá SAS vísa, at flogfelagið flutti 5,6 prosent færri ferðafólk í fyrsta ársfjórðingi í ár samanborið við sama tíðarskeið í fjør. Leiðslan í SAS væntar, at tað fer at ganga betur seinni í ár. Úrslitið verður hall, men leiðslan uggar seg við, at hallið eftir øllum at døma verður minni enn í fjør.

## Íslendingar ivast

Ein meiningakanning, sum samfelagsvísindadeildin á lærda háskúlanum í Reykjavík hevur gjørt, vísir, ar 70,3 prosent av teimum spurdu eru ímóti at fara upp í ES, um Bruxelles skal stýra fiskiskapinum í íslendskum sjógvi. Kanningin vísir eisini, at 77,7 prosent eru ímóti, at Ísland fer upp í ES, um gongdin í samveldinum verður tann vegin, at tey stóru londini skúgva tey smáu til viks.

# Øktur spenningur millum India og Pakistan

**Indiska verjumálaráðið leggur Pakistan undir at hava ábyrgdina av einum blóðugum álopi í Kashmir týsdagin**

INDIA OG PAKISTAN
*Árni Joensen*

Indisku myndugleikarnir siga seg hava avdúkað, at pakistanar høvdu ábyrgdina av álopinum á eina indiska herstøð í Kaluchak í landspartinum Kashmir týsdagin. Álopið kravdi 34 mannalív og er tað mest blóðuga síðani oktober í fjør.

Indiski verjumálaráðharrin George Fernandes var í gjár og vitjaði herstøðina, og hann legði ikki fingrarnar ímillum.

- Tað er Pakistan, sum hevur ábyrgdina av hesum. Pakistanar venja ungar menn og senda teir higar at fremja yvirgang. Men tað er ikki annað, enn vit kunnu vænta haðani, segði indiski verjumálaráðharrin.

Minst 33.000 fólk hava latið lív, síðani kreppan um Kashmir tók seg upp í 1989. India leggur Pakistan undir at stuðla muslimskum loysingarmonnum, sum halda til í landspartinum. Pakistan hevur víst hesum aftur. Pakistanar siga, at teir taka undir við hugsjónunum hjá loysingarmonnunum, men at loysingarmenninir fáa ikki annan stuðul úr Pakistan.




*Fólk í indiska høvuðsstaðnum New Dehli mótmæla pakistansku uppíleggingini í Kashmir*
*Mynd: Reuters*

# Sjey lond á veg upp í NATO

**Eftir uttanríkisráðharrafundin í Reykjavík bendir alt á, at sjey evropeisk lond hava møguleika at fáa limaskap í verjusamgonguni**

NATO-FUNDUR
*Árni Joensen*

Fyri bert f
áum mánaðum síðani mettu vesturlendskir diplomatar, at bara tvey evropeisk lond høvdu møguleika at koma upp í NATO í hesum umfari. Londini vóru Slovenia og Slovakia, men eftir uttanríkisráðharrafundin í Reykjavík nú um dagarnar bendir alt á, at fleiri onnur lond kunnu vænta sær innbjóðing.

Danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, væntar, at talan verður um sjey nýggj limalond.

Diplometar í Reykjavík siga, at hini fimm londini, sum koma afturat, eru Estland, Letland, Litava, Bulgaria og Rumenia, sum eftir øllum at døma gerast limir í heimsins sterkastu hernaðarsamgongu á vári næsta ár.

Russland hevur leingi verið ímóti, at tey trý Baltalondini fara upp í NATO, men nú Russland og NATO hava skrivað undir eina søguliga samstarvsavtalu, er russiska mótstøðan ikki so stór longur. Serliga russiski forsetin, Vladimir Putin, tykist hava broytt hugsan viðvíkjandi Baltalondunum.

Fleiri NATO-lond hava verið ímóti at lata Bulgaria og Rumenia fáa limaskap orsakað av teimum ivasomu demokratisku viðurskiftunum í teimum báðum londunum, men diplomatar siga, at londini hava fingið ein nýggjan hernaðarligan týdning eftir tað, sum hendi tann 11. september í fjør. Á fundinum í Reykjavík varð nevnt, at júst tað kann fáa avgerandi týdning fyri viðurskiftini á Balkan at lata Bulgaria og Rumenia fáa limaskap í verjusamgonguni.

Amerikanarar hava mælt hinum londunum til at taka undir við bulgarskum og rumenskum limaskapi, eftir at tey bæði londini hava játtað at lata USA nýta flogvallir til møgulig bumbuálop á Irak. Fyri USA hevur hetta stóran týdning, tí tað muslimska Turkaland hevur aftrað seg við at lata amerikanarar nýta flogvallir har til álop á Irak.

Tað er tó ikki heilt vist, at Slovakia og Slovenia fara upp í NATO. Val verður í Slovakia í september, og nógv bendir á, at flokkar, sum eru ímóti NATO-limaskapi, fara at vinna valið. Í Slovenia skal fólkið taka støðu á einari fólkaatkvøðu, og meiningakanningar vísa, at tey, sum eru ímóti NATO-limaskapi, fáa størri undirtøku enn hin parturin.

Úr Norðurlondum:

## Skrivar bók

Fólkatingsbólkurin hjá danska Vinstraflokkinum gjørdi týsdagin av at tveita tann umstrídda Peter Brixtofte úr tingbólkinum. Samstundis hevur Anders Fogh Rasmussen, floksformaður biðið valfelagið í Farum geva honum durafjórðingin.

Men Brixtofte er ikki tann, sum letur seg kúga. Í gjár boðaði hann frá, at hann er farin undir at skriva eina bók, og hann lovaði, at tað verða mong, sum fáa nakað at hugsa um, tá bókin kemur út.

## Drotningin má skifta sigarettir

Danska sjónvarpið hevur avdúkað, at Margretha drotning roykir eitt slag av grikskum sigarettum, sum eru so sterkar, at tað er ikki loyvt at innflyta tær til Danmarkar og enn minni at selja tær.

Ein kanning hjá sjónvarpinum vísti, at fleiri handlar í Keypmannahavn og øðrum stórum býum selja sigarettirnar, sum eita Karelia. Danska heilsustýrið sigur, at tað er ikki loyvt at innflyta hesar sigerettirnar til Danmarkar, tí tjørunøgdin í teimum er størri enn tað, sum er loyvt í Danmark.

Handlarnir hava játtað at taka sigarettirnar av hillunum, og innflytarin hevur játtað at gevast við at innflyta tær. Spurningurin er so, hvat drotningin ger. Kongshúsið boðaði týskvøldið frá, at málið verður tikið upp til viðgerðar við drotningina.

## Prestar í neyð

Fleiri danskir prestar hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman, og í fjør fingu 70 prestar fíggjarliga hjálp úr tí serliga hjálpargrunninum hjá prestunum. Formaðurin í grunninum sigur við Kristeligt Dagblad, at prestar kunnu koma í fíggjarligar trupulleikar sum so mong onnur. Orsøkin kann vera sjúkia, hjúnarskilnaður, lestrarskuld ella okkurt óvæntað.

# Bilar

Nr. 91 • hósdagur • 16. mai 2002 • 76. árg.

# Bilaframsýning í Ítróttarhøllini á Hálsi



*Umframt VW og Seat høvdu teir á bilasøluni hjá Øssur Johannesen fingið ein Audi A4 2.5 TDI Quattro við 180 hk til framsýningina. Ein luksusbilur til næstan hálva millión*



*Á básinum hjá Eyðbjørn Hansen vóru nógvir bilar, m.a hesin Suzuki Ignis*



*Berg Motor høvdu Mazda 626, Premacy og Demio*




*Super Dekk høvdu ein bás við Goodyear dekkum*



*Norðbil høvdu eitt stórt úrval av Honda, Skoda og Hyundai bilum, sum til dømis hendan sera smarta Hyundai Coupé 2.0 FX*



*D.B.Bilar sýndu fram Rover, Land Rover og Kia bilar, sum t.d hendan nýggja Kia Shuma*

**Hetta er tíðin tá bilaframsýningar eru ymsastaðni kring landið. Almenni áhugin fyri bilum er ofta størstur um várið, tá flestu fólk hava fingið útgoldið frítíðarpening og nógv hava ætlanir um ein túr uttanlands við bilinum**

BILAFRAMSÝNING
*Magnus Gunnarsson*

Á bilaframsýningini, sum hondbóltsfelagið Kyndil skipaði fyri seinasta vikuskifti í Ítróttarhøllini á Hálsi, vóru 6 bilhandlarar við tilsamans 12 bilmerkjum. Bilhandlararnir vóru Bilasølan v. Øssur Johannesen, Berg Motor, Norðbil, Eyðbjørn Hansen, Esmar Simonsen og D.B. Bilar. Super Dekk hevði eisini ein bás við dekkum, har nýggjast Goodyear F1 dekkið varð sýnt fram.

### Fleiri nýggjheitir

Av nýggjheitum kunnu vit nevna at á básinum hjá Bilasøluni v. Øssur Johannesen høvdu teir nýggjasta VW Polo og ein Audi 2.5 TDI Quattro við 180 hk. Hesin bilurin var komin higar til framsýningina. Hjá Berg Motor høvdu tey nýggjastu útgávuna av Mazda Premacy. Norðbil hevði ein nýggjan Hyundai Coupé og nýggjastu útgávuna av Honda CR-V. Eyðbjørn Hansen hevði Suzuki Liana í sedan útgávu. Hjá Esmar Simonsen var Daewoo Tacuma sum vørubilur og D.B.Bilar høvdu 2 nýggjar Kia bilar, Shuma og vørubilin Pregio.